## Norðurlendsk jazzkapping í Havn

TÓNLEIKUR

Kappingin Young Nordic Jazz Comets er tann árliga kappingin fyri bestu jazzbólkar í Norðurlondum, har limirnir í bólkinum eru undir 26 ár.

YNJC hevur seinastu seks árini verið uppá skift í øllum teim norðurlendsku høvuðstøðunum, og verður kappingin í ár í Norðurlandahúsinum í Tórshavn, leygardagin 10 sept. kl. 13.00.

Kappingin er skipað soleiðis, at hvør bólkur spælir í 25 min, og síðan meta tríggir dómarar um hvør framførslu var best.

Vinningurin er ein turné í Norðurlondum.

Luttakandi bólkarnir eru:

Stryknin, Ísland
JazzKamikaze, Danmark
Listen, Noreg
Ben-Jammin, Føroyar
Sound of the Millenium, Svøríki
Reactor-5, Finland
Jazzvanten, Áland

Tey størri londini hava í farna árinum havt innleiðandi umfør, har lokali vinnarin so umboðar landið á konsertini í Norðurlandahúsinum.

Tey smærru londini velja ofta út bólkar at umboða seg, og soleiðis hevur eisini verið við tí føroysku luttøkuni.

Undanfarnu árini hava føroyskir bólkar verið við á hvørjari finalu.

Av tónleikarum sum hava luttikið fyri Føroyar, kunnu nevnast Búi Dam, Heðin Z. Davidsen, Brandur Jacobsen, Mikael Blak, Dánjal á Neystabø, og mangir aðrir.

Føroyski bólkurin í ár, Ben-Jammin, er mannaður við evnaríkum tónleikarum:

Tróndur Olsen - trompet
Dávur Juul Magnussen - trombone
Benjamin Petersen - guitar
Jan Rúni Poulsen - trummur og ásláttur

YNJC er tað besta, sum Norðurlond hava at bjóða innan jazz undir 26 ár, og støðið er sera høgt og víttfevnandi, - líka frá reinum jazzi til tað rokkuta.

YNJC verður fyriskipað av Jazzforbundunum hjá teimum størri londunum, saman við jazzáhugafeløgum í teimum smærri londunum.

Konsertin verður í: Norðurlandahúsinum leygardagin 10 sept., kl. 13.00.

Ókeypis atgongd.

# Hálvur prísur til vinnuna í Suðuroy

**Tey krøv, sum Samferðslubólkurin í Suðuroy setir til nýggja Smyril, eru burtur úr vón og viti, sigur Hendrik Old, tingmaður fyri Suðuroy**

NÝGGI SMYRIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Heldur enn fleiri túrar beinanvegin, hevur tað nógv størri týdning at lække farmagjøldini sigur Hendrik Old, samgongutingmaður úr javnaðarflokkinum fyri Suðuroynna*

Prísurin fyri at flyta farm ímillum Suðuroynna og Havnina, eigur at verða lækkaður.

Tað sigur Hendrik Old, løgtingsmaður og limur í samgonguni.

Hann sigur, at samgongan hevur leingi tosað um at lække prísin at flyta farm við Smyrli ímillum Havnina og Suðuroynna, so at hann verður ájavnt tað, sum tað kostar at flyta farm um Leirvíksfjørð.

Nú nýggi Smyril kemur, hevur samgongan ikki tosað so nógv um ferðaætlanina.

– Vit hava heldur viðgjørt spurningin um kappingarførið hjá vinnulívinum í Suðuroy og í tí sambandi hava vit umrøtt spurningin um at lækka farmagjaldið.

Hann sigur eisini, at sum heild er samgongan samd um, eitt tað fyrsta punktið at taka upp í sambandi við nýggja Smyril eigur at vera at lækka flutningsgjaldið ímillum Suðuroynna og Havnina og hann.

– Verður nøgdin á farmi óbroytt, fer tað at kosta landinum 2-4 milliónir um árið, men vit eru samd um, at hetta hevur størsta týdning fyri vinnulívið í Suðuroy beint nú. Men økist nøgdin á farmi, kostar tað minni, men vit halda, at vit eiga at sterma eftir at finna fígging til tað fyrst og fremst.

Hendrik Old sigur, at hetta snýr seg ikki bara um møguleikan fyri at flyta fisk og farm til Suðuroyar.

– Hetta snýr seg eisini um at bøta um møgukeikan hjá vinnurekandi í Suðuroy at bjóða seg fram til arbeiði allastaðni í landinum. Men í løtuni er flutningurin av maskinum og stórum bilum so dýrur, at tað skerjir kappingarførið hjá virkjum og fyritøkum í Suðuroy at arbeiða norðanfyri.

*Heldur tú ikki at tað hevur týdning at Smyril økir túratalið ímillum Suðuroy og Havnina?*

– Eg eri greiður yvir, hvussu stóran týdning, tað hevur at økja túratalið. Men eg meti, at í fyrstu atløgu hevur tað størri týdning at farmaprísurin lækkar.

Hendrik Old heldur annars ikki, at tað er rætt at leggja skip og manning undir trýst beinanvegin skipið kemur, nú uppundir vetur.

– Lat okkum fáa veturin afturum, so at manningin fær vant seg við skipið, uttan at liggja undir trýstið, so kunnu vit taka spurningin um ferðaætlanina uppaftur seinni. Tað er ongin vanlukka um hann siglur eftir galdandi ferðaætlan eina tíð afturat.

Hendrik Old heldur at sum frálíður er tað sjálvsagt, at møguleikarnir fyri at økja túratalið verða kannaðir. Serliga heldur hann at tað er brúk fyri at økjatúratalið um vikuskiftið.

– Tað nyttar heldur ikki at fornokta tað, tí tað er eisini ein fíggjarligur spurningur, serliga nú hækkingin í oljuprísinum ger skipið væl dýrari í rakstri, enn upprunaliga mett.

### Burtur úr vón og viti

Annars heldur Hendrik Old, at tey krøv, sum Samferðslubólkurin í Suðuroy setir til nýggja Smyril, eru burtur úr vón og viti.

Hann sipar serliga til kravið um at nýggi Smyril skal sigla hvønn dag í vikuni úr Suðuroy klokkan seks á morgni.

Morguntúrurin er høvuðstúrurin hjá Suðuroynni og í løtuni siglur hann allarflestu dagar klokkan sjey á morgni og tað er heilt burturvið at framskunda hann til klokkan seks. Tað er heilt burturvið, tí tá skulu fólk í summum bygdum upp klokkan 4.30 á morgni. Afturfyri eru tey so í Havn klokkan 7.40 á morgni, men tá er onki opið og skulu tey ganga og bíða til hálvanannan-tveir tímar, tí onki letur upp, fyrrenn klokkan 9 í fyrsta lagi.

Hendrik Old heldur, at tað eigur enntá at verða umhugsað, at flyta tann fyrsta túrin á morgni frá klokkan sjey til klokkan 7.30.

# Eitt krav at Smyril skal sigla fleiri túrar

**Suðuroyartingmenn eiga at krevja, at nýggi Smyril fer at sigla fleiri túrar enn Smyril nú ger, sigur ein av tingmonnunum fyri Suðuroy, Johan Dahl**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Tað einasta, vit biðja um, er ein túr afturat um dagin og tað má vera eitt krav til samgonguna, sigur Johan Dahl samgongutingmaður úr sambandsflokkinum fyri Suðuroynni*

Tað eigur at verða eitt krav, at túratalið ímillum Suðuroynna og Havnina verður økt, nú nýggi Smyril kemur.

Tað sigur Johan Dahl, løgtingsmaður fyri Suðuroynna og limur í samgonguni.

– Smyril er bygdur fyri at gera umstøðurnar betri fyri flutningi ímillum Suðuroy og Havnina. Og so haldi eg eisini, at hann skal brúkast til tað.

Johan Dahl sigur, at tað, sum hevur størstan týdning, er at fleiri túrar verða ímillum og tí verður samgonga noydd til at kanna eftir, hvussu Smyril kann sigla tríggjar ferðir ímillum um dagin.

– Um hann ikki siglur tríggjar ferðir hvønn dag, so eigur hann at gera tað tríggjar dagar um vikuna.

Hann vísir á, at um Leirvíksfjørð verður siglt alla tíðina.

– Vit eiga at veita Suðuroynni somu tænastur, ikki bara fyri at gera tað lættari hjá suðuroyingum at sleppa norðureftir, men eisini so at tað verður lættari hjá fólki og tænastuveitarum norðanfjørðs at koma til Suðuroyar.

Hann sigur, at tí eigur samgongan at finna fíggingina, so at hann kann sigla ein túr afturat nakrar dagar um vikuna.

– Tað sigur seg sjálvt, at tað kostar pening at fáa Suðuroy á føtur aftur og tað mugu vit so taka við.

– Vit hava brúkt hundraðtals milliónir fyri at gera umstøðurnar hjá vágafólki og norðoyingum betri og tí mugu vit eisini geva suðuroyingum betri sømdir. Vit hava lyft fleiri onnur øki í landinum fram á leið og tað mugu vit eisini gera við Suðuroynna. Kostar tað átta milliónir, so lat tað kosta átta milliónir, sigur Johan Dahl.

– Tað einasta, vit biðja um, er at fáa ein túr afturat um dagin so at vit hava tríggjar, og tað er lítið afturímóti tí, sum onnur øki í landinum hava, leggur hann afturat.